## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Hvassur vindur ella skrið av eystri, seinnapartin veksur hann vindin upp í storm av landnyrðingi. Ælingur, sum frálíðir kavi. Hitin um dagin millum 4 og 7 stig, um kvøldið fellur hann niður um frostmarkið.




**Veðrið hósdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi og norði og kavæling-ur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av út-nyrðingi, men seinna-partin minkar hann vindin niður í eitt lot. Kavæelingur, fyrrapart-in, men annars yvirhøv-ur turt og sólglottar. Hitin millum frostmark-ið og +3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul millum útnyrðing og útsynning og yvirhøvur turt, men sunnudagin upp í hvassan vind av vestri og ælingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

# Her liggur hann væl

Tað er ymiskt, hvussu fuglur reiðrast. Mest umráðandi er kanska at fáa frið, men í nógvar mátar vilja flúgvandi verurnar eisini hava, at heim teirra skal vera fjálgt og lýtt.

Okkum vitandi plaga beinleiðis krøv til streymføring ikki at verða sett av fuglum, men tað kundi tó bent á, at tað hevur verið fremsta málið í hesum førinum.

Yvir við bilasøluna hjá Derek Brockie í Jónas Broncks gøtu hildu tey seg ikki hava tørv á arbeiðsbilinum um páskirnar, og tí varð hesin settur í frið og náðum – hildu tey.

Tí staramamman sá sær her ein fínan møguleika at fáa eitt reiður í friðarligum umhvørvi. Friðurin vardi í øllum førum allar páskirnar, men tá bilurin aftur skuldi brúkast, var liðugt. Staramamman varð noydd at flyta, men áðrenn hetta varð gjørt, fekk myndamaður okkara mynd av reiðrinum.

-jm




*Við einum reiðri beint á akkumulatorinum, hevur staramamman havt møguleika fyri elektriskum hita, skuldi hetta verið neyðugt*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | -1 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 9 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 11 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 20 |
| Athen | -- |
| Malta | 15 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 21 |
| New York | 9 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár.**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. vestan fyri Ísland fer í landsynning eystan og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir og gevur nógvan vind – kanska storm – av landnyrðingi og norði á okkara leiðum.


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 4/4 kl. 06[00]– 5/4. 06[00]. Hitin í gjár: 3,1°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 7,1 mm – mált frá 4/4 kl. 06[00]– 5/4 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 15,8 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

6. apríl

2. apríl Seinna kvarter
4. apríl Mánin næstur jørðini
8. apríl Tendring

Kelda. Álmanakkin 2005

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 6. apríl | 05.28 | 17.52 | 04.28 | 16.52 | 04.43 | 17.07 | 07.28 | 19.52 | 08.28 | 20.52 | 03.43 | 16.07 | 02.43 | 15.07 | 05.43 | 18.07 | 06.43 | 19.07 | 05.13 | 17.37 | 06.28 | 18.52 |
| 7. apríl | 06.14 | 18.37 | 05.14 | 17.37 | 05.29 | 17.52 | 08.14 | 20.37 | 09.14 | 21.37 | 04.29 | 16.52 | 03.29 | 15.52 | 06.29 | 18.52 | 07.29 | 19.52 | 05.59 | 18.22 | 07.14 | 19.37 |
| 8. apríl | 06.59 | 19.22 | 05.59 | 18.22 | 06.14 | 18.37 | 08.59 | 21.22 | 09.59 | 22.22 | 05.14 | 17.37 | 04.14 | 16.37 | 07.14 | 19.37 | 08.14 | 20.37 | 06.44 | 19.07 | 07.59 | 20.22 |
| 9. apríl | 07.44 | 20.07 | 06.44 | 19.07 | 06.59 | 19.22 | 09.44 | 22.07 | 10.44 | 23.07 | 05.59 | 18.22 | 04.59 | 17.22 | 07.59 | 20.22 | 08.59 | 21.22 | 07.29 | 19.52 | 08.44 | 21.07 |
| 10.apríl | 08.30 | 20.53 | 07.30 | 19.53 | 07.45 | 20.08 | 10.30 | 22.53 | 11.30 | 23.53 | 06.45 | 19.08 | 05.45 | 18.08 | 08.45 | 21.08 | 09.45 | 22.08 | 08.15 | 20.38 | 09.30 | 21.53 |

5 707265 100036 >